


*Aftast frá vinstru: Suni Hansen, Thorvald Danielsen, Boban Ilic, Hjalti Josephsen, Rúni Weihe, Bárður Jacobsen. Mittast frá vinstru: Margit Joensen, Eina S. Kalsø, Birgit Guttesen, Poulina Øregaard. Fremst frá vinstru: Rói Hentze, Uni Reinert Petersen*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen*

# Mjølnir og ÍF gjørdu slætt borð

**FLOGBÓLTUR** Birgit Guttesen úr Mjølni og Rúni Weihe úr ÍF blivu kosin ársins spælarar, tá flogbólturin setti punktum fyri einum spennandi vetri. Mjølnir og ÍF vunnu alt, sum var at vinna

Hilmar Jan Hansen

Leygarkvøldið var flogbóltsdeildin hjá TB vertur fyri stóru gallaveitsluni hjá flogbóltinum, sum var hildin í Trongisvági. Hølini vóru vakurt pyntað og borðreitt var við framúr góðum mati, umframt at undirhald og serstakliga góður dansitónleikur við Neils Band settu sín dám á.

At Flogbóltssambandið hevði latið hetta upp í hendurnar á flogbóltsfólkunum á Tvøroyri, var einki at undrast á, tí tey har suðuri duga tiltikið væl at skipa fyri. Eitt dømi um tað er, at finalurnar hjá teimum yngru mestsum fast verða lagdar í Trongisvági, tí tá kunnu tey í Flogbóltssambandinum vita, at alt verður lagt so væl til rættis, sum tað yvirhøvur ber til.

Flogbóltsfólkini vóru gott og væl hundrað í tali, og lagið var av tí besta. Eftir ein langan flogbóltsvetur kundu tey endiliga taka sær av løttum og hugna sær saman, og hóast tey í vetur hava staðið hvør sínum megin netið og hava kappast ímóti hvørjumøðrum, rann alt saman í eitt á gallaveitsluni.

## Ársins bestu heiðrað

Sum vanligt er eitt slíkt kvøld, var størsti áhugin fyri, hvørjir spælarar fóru at verða heiðraðir sum teir bestu í farna kappingarárinum. Hetta var tikið í smáum ígjøgnum borðhaldið, har byrjað var við ársins dómarum og síðani farið ígjøgnum ársins venjara, stjørnuskot, verjuspælara, álopsspælara, blokkspælara, hevara og at enda ársins spælara – alt hetta hjá bæði kvinnum og monnum.

Her vísti tað seg, at tey bæði fremstu liðini, Mjølnir hjá kvinnum og ÍF hjá monnum, fóru avstað við tí allarmesta. Hesi bæði liðini vunnu greipuna í vetur, og serliga gjørdu Mjølnir-kvinnurnar veruliga bart, tí tær vunnu alt, sum var hjá kvinnunum at koma eftir, og tað kann valla tulkast sum annað enn eitt stórt herðaklapp til klaksvíkskvinnur.

Menninir hjá ÍF fóru avstað við tí nógva, men í tveimum førum fingu tapandi mansfinalistarnir í bæði steypa- og FM-finalunum, Mjølnir, tikið seg framum og vunnið. Samanumtikið gjørdist hetta kvøldið hjá teimum, ið vunnu mest í vetur.

hilmarjan@sosialurin.fo

## Ársins bestu í flogbóltinum

### ÁRSINS SPÆLARI

| | Kvinnur | Menn |
|---|---|---|
| 1 | Birgit Guttesen (Mjølnir) | Rúni Weihe (ÍF) |
| 2 | Anja S. Danielsen (Fleyr) | Boban Ilic (Mjølnir) |
| 3 | Gudrid Nolsøe (TB) | Bartal Eliasen (ÍF) |

### ÁRSINS HEVARI

| | Kvinnur | Menn |
|---|---|---|
| 1 | Eina S. Kalsø (Mjølnir) | Thorvald Danielsen (Mjølnir) |
| 2 | Annika á Stongum (SÍ) | Ólavur Jensen (SÍ) |
| 3 | Maja Popovich (ÍF) | Hans Fróði Jensen (Fleyr) |

### ÁRSINS BLOKKSPÆLARI

| | Kvinnur | Menn |
|---|---|---|
| 1 | Lena í Buð (Mjølnir) | Hjalti Josephsen (Mjølnir) |
| 2 | Elisabeth Purkhús (Mjølnir) | Suni Juul Pedersen (Fleyr) |
| 3 | Karina Debes (Fleyr) | Brian Poulsen (ÍF) |

### ÁRSINS ÁLOPSSPÆLARI

| | Kvinnur | Menn |
|---|---|---|
| 1 | Birgit Guttesen (Mjølnir) | Rúni Weihe (ÍF) |
| 2 | Anja Danielsen (Fleyr) | Boban Ilic (Mjølnir) |
| 3 | Sofía Purkhús (Mjølnir) | Hjalti Josephsen (Mjølnir) |

### ÁRSINS VERJUSPÆLARI

| | Kvinnur | Menn |
|---|---|---|
| 1 | Margit Joensen (Mjølnir) | Uni Reinert Petersen (ÍF) |
| 2 | Karin Mikkelsen (SÍ) | Hjalmar Joensen (Fleyr) |
| 3 | Guðrið Syderbø (Fleyr) | Rúni Weihe (ÍF) |

### ÁRSINS STJØRNUSKOT

| | Kvinnur | Menn |
|---|---|---|
| 1 | Poulina Øregaard (Mjølnir) | Bárður Jacobsen (ÍF) |
| 2 | Rannvá Berg í Heiðinum (TB) | Arthur Poulsen (TB) |
| 3 | Femja Mortensen (TB) | Niels Erik Andersen (SÍ) |

### ÁRSINS VENJARI

| | Kvinnur | Menn |
|---|---|---|
| 1 | Boban Ilic (Mjølnir) | Suni Hansen (ÍF) |
| 2 | Romica Øster (Fleyr) | Boban Ilic (Mjølnir) |
| 3 | Gudrid Nolsøe (TB) | Rajko Petrovic (SÍ) |

### ÁRSINS DÓMARI

1 Jan Hentze
2 Tummas Óli Mortensen
3 Rúna Hentze